

# Samkomublaðið fyri juli/aug

# 2016

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar







www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



**Tann burturvilsti sonurin og sonurin,
ið var eftir hjá pápanum**

Ari Langgaard

**Tann burturvilsti sonurin**
Flest øll kenna søguna um tann burturvilsta sonin. Hvussu sonurin bað um alla sína ogn frá pápa sínum, fór út og spilti hana burtur. Vendi síðani heim aftur til pápa sín við ringari samvitsku, men var skelkaður, tí pápin kom rennandi við fevnandi ørmum, tí sonurin hevði vent við.

Eg eri mangan komin fram fyri Guð við følilsi av skomm og skitinleika, men hvørja ferð, eg eri komin til Hann, hevur Hann "tikið meg upp" og klemmað meg nakað so fast. Eg leggi meg sjálvan fullkomiliga niður og verið fullkomiliga fyltur av Guði.
*"Tá knø míni raka jørðina, nemi eg við skýggini".*

**Sonurin, ið var eftir hjá pápanum**
Eg havi ofta følt meg sum sonin, ið hevur verið eftir hjá pápanum. Hann, sum gjørdi eftir boðunum hjá pápanum og royndi sítt fyri at síggjast sum ein góður sonur.

Eg havi nú eftir hondini verið hjá pápanum í eina tíð, men eg havi mist leiðina so ofta.

Eg havi bara hugsað um garðin rundan um havan. Havi roynt at málað hann fleiri ferðir, so at hann sær gott út, men málingin dettur av hvørja ferð, eg havi málað hann, sum ger, at garðurin sær sprekkutur út aftur, men eisini flekkutur. Meðan eg havi hugsað um, hvussu eg skal fáa henda garðin at síggja gott út, havi eg gloymt havan. Alt tað flotta, sum kann vaksa so vakurt, um tað verður sáað.

Í endanum á Lukas kap. 15, vers 31, sigur pápin soleiðis við sonin, ið var eftir hjá pápanum: "Barn, tú ert altíð hjá mær, og alt mítt er títt".

*"Tak garðin niður, sáa havan og lat hann blomstra".*

**Vit eru Systkin**
Tað seinasta versið "Lukas kap. 15,32" sigur: "men nú eiga vit at vera (fró og glað); tí hesin bróður var deyður og er vorðin livandi, var mistur og er funnin".

Í dag er ein savnaður, sum eitur "Vit eru systkin". Tað er ein samling, har "øll" kunnu møtast og verða systkin í Guði. Har ein altíð følir seg vælkomnan, elskaðan, umfevndan og virdan. Fólk eru ómetaliga fró og glað, tá ein vendur við, líka sum í líknilsinum, líka sum sonurin eigur at vera, sum var saman við pápanum.

Kjarnan í "Vit eru systkin" felagsskapinum, er fylt við yvirflóð av Guðs kærleika, sum mong føla og vita fer at røkka langt út um garðarnar í føroyska havanum.

*"Á knæ vit sáa og bera Andans vøkstur í yvirflóð frá hava til hava"*

# Skrá fyri juli/aug

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 11. juli | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 12. juli | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 13. juli | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Mikudagur | 13. juli | kl. 20.00 : | LAKS í Lívsins Orð |
| Sunnudagur | 17. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti. Bjørgfinnur Heinesen skipar fyri Ronit, ið er messianskur jødi luttekur Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 18. juli | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 19. juli | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 20. juli | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósadgur | 21. juli | kl. 20.00: | LAKS í Soli Deo Gloria |
| Sunnudagur | 24. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti. Ólavur Jacobsen skipar fyri |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 25. juli | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 26. juli | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 27. juli: | | Kaféterian er stongd! |
| Leygardagur | 30. juli | kl. 20.00: | LAKS í Kelduni. Rúni Rasmussen talar |
| Sunnudagur | 31. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti við Pola Jacobsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 1. august | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 2. august | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 3. august: | | Kaféterian er stongd! |
| Mikudagur | 3. august | kl. 20.00: | LAKS í Lívsins Orð |
| Sunnudagur | 7. august | kl. 11.00: | Morgunmøti við Øyvind Bjerkenes Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 8. august | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 9. august | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 10. august | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 13. august | kl. 20.00: | LAKS í Lívsins Orð |
| Sunnudagur | 14. august | kl. 11.00: | Morgunmøti |

# Lýsingar

Til summarskránna hava vit fingið ymiskar persónar at skipa fyri møtunum. Hesi koma møguliga sjálv at tala, men tað kann eisini verða ymiskt spontant, sum kemur inn.

**Arbeiðsdagur í Kelduni**
Mikudagin 3. august verður ein arbeiðsdagur inni í Kelduni. Fokus verður á Fрískúlan, at fáa ymiskt gjørt, soleiðis at skúlin verður klárur til skúlabyrjan mánadagin 15. August.
Vit fara m.a. at gera høvuðsreint, gera ymiskar ábøtur og mála liðugt.
Byrjað verður kl 13, drekka kl. 15 og døgurði kl. 18.30.
Øll eru vælkomin at vera við - og vit vóna at fleiri taka undir við hesum

**"LAKS" ungdómsmøtir í summar**
Eins og undanfarna ár fara vit aftur í summar at hava felags ungdómsmøtir saman við Lívsins Orð og Soli Deo Gloria. Vit skiftast um at hava LAKS-møtir, soleiðis, at tá vit hava ungdómsmøti, so hava tey onki, men koma til okkara, og tá hini hava ungdómsmøti, hava vit onki AWAKE, men fara til teirra møtir. LAKS møtini eru frá 2. juli til og 13. august, tá eitt stórt felags tiltak verður í Løkshøll. Meiri kunning verður á Facebook og keldan.fo.

**Felags møti saman við Oasuni**
Sunnudagin 21 august fara vit at hava eitt felgsmøti saman við Oasuni, har Johan Petur Johannesen og Pauli Høj tala. Keldan og Oasan luttaka við sangi. Møguleiki er at tekna seg til døgurða. Ætlanin er at hava ein innsamling til frama fyri Bíbligufelagið.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584